# Veðrið



**Fimm-daga-forsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av eystri og møguliga sirm eitt skifti, annars sólglottar, men eisini mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið Ólavsøkuaftan:**
Lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig, um náttina niður í 10 stig.




**Veðrið Ólavsøkudag:**
Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 12 og 15 stig, um náttina niður í 9 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig, um náttina niður í 6 stig.



# Springarar uttan fyri Kvívík

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Um fimmtíðina týsdagin seinnapart fór ein springaraflokkur norður móti Vestmannasundi. Springararnir vóru sæddir útfyri Kvívík og Leynum og ein bátur fór út teirra og hevði upp mastur. Men áðrenn aðrir bátar komu til, tóku springararnir sjógv á bak og hildu avstað norður gjøgnum Vestmannasund. Eini 30 springarar vóru at síggja í senn, so talan var um ein stóran bólk, kanska eini 300 springarar.

Springarar eru ikki óvanligir at síggja hesa tíðina. Týsdagin kom bólkurin heilt inn á vikina í Kvívík. Nógv fólk var samankomið at hyggja eftir hesum vøkru djórum. Eisini nógv útlendsk ferðafólk vóru stødd í Kvívík og á vegnum millum Kvívík og Leynar.

Tvøstið á springara er óføra góður matur og tað er nógvastaðni í landinum at menn plaga at halda springarum til.

Men bólkurin uttanfyri Kvívík fekk frið týsdagin

## Norskir avhaldsmenn

Sodavatnstilboðini frá báðum føroysku bryggjaríunum standa helst á borðunum í Losjuni í Havn, nú 80 norskir avhaldsmenn halda summarstevnu í Føroyum. Stevnan byrjaði 26. juli og endar 30. august. Fleiri fyrilestrar verða hildnir við føroyskum og norskum luttakarum. Útferðir verða gjørdar og norðmenninir ætla eisini at halda ólavsøku




Lágtrýstið við Írland fer spakuliga vestureftir og hátrýstið norðanfyri Føroyar stendur mestsum í stað.




Hátrýstið sunnanfyri Grønland breiðir seg eystureftir.




**Hitalagið mált frá 25./07.kl 06⁰⁰–26./07. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,8°C**
Minsti hiti máldur í juli: **0,4°** Mesti hiti máldur í juli: **20,2°**




Avfallið: 0 mm – **mált frá 25./07. kl 6⁰⁰–25./07. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juli: **20,1 mm**

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | – |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 16 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 21 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannahavn | 17 |
| Helsinki | 12 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 35 |
| Paris | 18 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 36 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 16 |
| New York | 22 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |

## Vestfalskyrrindi

24. juli: Seinna kvarter
30. juli: Mánin næstur jørðini
31. juli: Tendring

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. juli | 1.54 | 14.40 | 0.54 | 13.40 | 1.09 | 13.55 | 3.54 | 16.40 | 4.54 | 17.40 | 0.09 | 12.55 | 11.55 | – | 2.09 | 14.55 | 3.09 | 15.55 | 1.39 | 14.25 | 2.54 | 15.40 |
| 27. juli | 3.28 | 16.12 | 2.28 | 15.12 | 2.43 | 15.27 | 5.28 | 18.12 | 6.28 | 19.12 | 1.43 | 14.27 | 0.43 | 13.27 | 3.43 | 16.27 | 4.43 | 17.27 | 3.13 | 15.57 | 4.28 | 17.12 |
| 28. juli | 4.51 | 17.28 | 3.51 | 16.28 | 4.06 | 16.43 | 6.51 | 19.28 | 7.51 | 20.28 | 3.06 | 15.43 | 2.06 | 14.43 | 5.06 | 17.43 | 6.06 | 18.43 | 4.36 | 17.13 | 5.51 | 18.28 |
| 29. juli | 5.58 | 18.26 | 4.58 | 17.26 | 5.13 | 17.41 | 7.58 | 20.26 | 8.58 | 21.26 | 4.13 | 16.41 | 3.13 | 15.41 | 6.13 | 18.41 | 7.13 | 19.41 | 5.43 | 18.11 | 6.58 | 19.26 |

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

Original bosal Útstoyt
p/f Esmar Simonsen
Kambsdalur
FR-530 Fuglafjør›ur
Tlf. 444405
Fax444629

Flog-ferðir
ring 345900